kann útflyta møguliga olju frá føroyskum øki via bretsku installatiónirnar

– Hetta er eitt risatilboð til Føroyar, tí tað merkir, at ein sleppur undan at gera sera stórar íløgur í eitt nú olju-terminalar í Havn ella hvar tað skuldi verið. So ein sleppur við hesum eisini undan vandanum at skaða umhvørvið.

Stefan Hultberg sigur víðari, at BP er hugað fyri at hoyra meira frá føroyingum um eitt slíkt hugskot, tí skal tað gerast veruleiki, so mugu teir eisini til at byggja sínar pallar ol. nettup við tí fyri eyga at kunna taka olju av føroyskum øki eisini.

– Hetta vísir so aftur, hvussu stóran týdning tað hevur fyri føroyingar at fáa greitt tann politiska partin, t.v.s. hvat ein vil og hvat verður endin á trætuni um markið.

Eg haldi landsstýrið eigur at viðgera hesar spurningar, og tað ivist eg heldur ikki í, at tað ger.

## Helst somu løg

Men hvat heldur Stefan Hultberg so um møguleik-arnar fyri at jørðløgini føroysku megin eru tey somu sum tey, har bretar hava funnið olju.

– Eg haldi tað er rímulig orsøk til at halda, at jarð-frøðin inni á tí føroyska øk-inum líkist henni bretsku megin. Nettup tí haldi eg eisini, at uppdagingarnar eru so áhugaverdar fyri Føroyar. Ein kundi í veruleik-anum eins væl havt funnið slíka oljugoymslu í før-oyskum øki.

Munurin er so tann, at før-oysku megin er eisini ba-salt, og tað kann tí vera torførari at kanna undirgrund-ina her.

– Eg havi annars hoyrt fleiri jarðfrøðingar í olju-vinnuni siga, at tað er eingin orsøk til at halda annað enn at tað, sum finst á bretskum øki, ikki eisini finst før-oysku megin.

Stefan Hultberg kemur aftur til Føroya 22. mars. Tá skal hann greiða bygnaðar bólkinum frá teimum sam-ráðingum, hann hevur havt við umleið 50 oljufeløg.

Endamálið við hesum samráðingum var at vita, hvat oljuídnaðurin heldur um føroyska økið.

Stefan Hultberg, sum sjálvur hevur arbeitt hjá BP í sjey ár, heldur fyri, at hann, eftir at BP hevur funnið olju so nær Føroy-um, hevur góðar vónir um, at tað eisini finst olja á før-oyskum øki.

– Eg havi annars altíð hildið, at olja finst í før-oysku undirgrundi. Spurn-ingurin er bara, um vit kunnu finna hana og fara undir framleiðslu.

jan

*Varastjórin í Mærs Olie og Gas:*

# Mærsk enn ongan áhuga fyri føroysku undirgrundini



Ein av stóru oljubori-pallunum hjá Mærsk

*– Vit fylgja væl við í øllum tí, sum hendir, ikki bert við Føroyar, men allastaðni. Vit gera so okkara metingar út frá teimum upplýsingum, vit fáa. Enn er so einki komið fram, sum hevur fingið okkum at vísa føroysku undir-grundini serligan ans, sigur varastjórin í »Mærsk Olie og Gas«, o Wilfang, í samrøðu við Tíðindablaðið Sosial-in.*

*Danska oljufyritøkan fer neyvan at vísa Føroyum størri áhuga fyrr enn tað fyriliggja meira ítøkiligar og áhugaverdar upplýsingar. Bo Wilfang*

– Vit fylgja øllum tí, sum hendir í økinum millum Føroyar og Hetland, og vit gera so okkara egnu met-ingar um tað, vit fáa at vita.

Út frá teimum upplýsing-um, sum vit hava sæð higar-til, hava vit enn onga áhuga fyri føroysku undirgrund-ini.

*– Men tær oljukeldurnar, sum nýliga eru funnar við føroyska markið, hava tær ikki økt um tykkara áhuga fyri føroysku undirgrund-ini?*

– Vit meta gjølla um tær upplýsingar, sum koma fram, og okkara niðurstøða í dag er tann, at »Mærsk Olie og Gas« ongan áhuga hevur í løtuni at fara inn at arbeiða í føroysku undir-grundini.

*– Men hvat skal henda fyri at Mærsk Olie og Gas fer at vísa føroysku undir-grundini áhuga?*

– Tað veit eg ikki. Men eitt svar kann vera, at vit ynskja betri og meira ítøki-liga og meira hugaligar upplýsingar.

*– Merkir tað, at tit fara at vísa føroysku undirgrund-ini størri ans, tá tað fyri-liggja meira ítøkiligir upp-lýsingar um olju í undir-grundini?*

– Nei. Tá fara vit fyrst at meta um støðuna, um hetta er nakað, sum vit eiga at fylgja upp.

## Meta um øll øki

Uppá fyrispurning um tað hevur størri áhuga fyri eina danska fyritøku sum Mærsk Olie og Gas, tá talan er um ein part av ríkinum, sum her talan er um, enn um tað var okkurt annað øki, sigur Bo Wilfang, at teir gera sær sínar metingar av øllum økjum »nøkternt og objek-tivt«. Og tað gera vit eisini, tá tað snýr seg um Føroyar.

*– Tað hevur verið skrivað í føroyskum bløðum, at Mærsk-fyritøkan hevur gjørt kanningar í føroysk-um øki. Er tað rætt?*

Tað meini eg ikki vit hava gjørt.

Bo Wilfang sigur víðari, at teir í dag als ongan áhuga hava fyri øllum økinum millum Hetland og Føroyar sum her er talan um.

*– Men hava tit í Mærsk viðgjørt føroyska økið sum eitt møguligt framtíðar áhugaøki fyri tykkara virk-semi?*

Umráðið kring Føroyar verður eins og so mong onnur øki kring heimin tikið við í tær metingar, sum vit gera okkum.

*– Tað verður nógv tosað um at gera seismiskar kanningar og seinni íløgu-boringar við Føroyar. Hevur Mærsk Olie og Gas eins góðar møguleikar at fara undir kanningar á før-oyskum øki, sum eitt nú BP og Shell?*

Tað hava vit so avgjørt.

Bo Wilfang er vitandi um at føroyingar herfyri gjørdu eina avtalu við donsku stjórnina um at yvirtaka rættin til møguligt ræstin í undirgrundini. Hann sigur at henda avgerðin hevur einki broytt í virksemunum og ætlanunum hjá Mærsk Olie og Gas.

jan



*Mærsk stendur fyri stórum oljuvirksemi í Norð-sjónum, men enn er einki, sum hevur fingið hesa stóru oljufyritøkuna at seta kós móti føroysku undirgrundini*